Fyri 35 árum síðan:

# Sakarmálið hjá Zakariasi



Í februar 1975 fall dómur í Føroyarætti í sakarmálinum, sum Zakarias Wang hevði reist ímóti sjey av valevnunum hjá Tjóðveldisflokkinum í Suðurstreymoy til seinasta løgtingsval og formanninum í aðalnevnd floksins fyri skuldsetingar um straffbar viðurskifti, ið hesi høvdu sett fram í blaðnum 14. September og Útvarpi Føroya í november mánað í fjør móti saksøkjaranum.

Dómarin segði, at sannleikaprógv vóru ikki førd fyri skuldsetingunum, og dømdi hann tí tveir av teimum skuldsettu 14 daga hefti, meðan hini seks fingu 14 dagbøtur á 50 krónur, umframt at øll átta skuldu gjalda sakarmálskostnaðin.

Á myndini eru Zakarias Wang (h.m.) og verji hansara Halgir Winther Poulsen (v.m.). Saman við teimum eru Hanna Lisberg og Suni Jacobsen.

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór1975*

Fyri 25 árum síðan:

# Keld og Hilda í Føroyum

**Sosialurin skrivar tann 19. februar 1985 um at tað er oyðsl av milliónum av krónum at heita kølivatnið og roykurin frá elverkinum hjá SEV fer beint upp í loft. Blaðið skrivar eisini at Keld og Hilda Heick kom til Føroya hósdagin**

Heita kølivatnið og roykurin frá elverkinum hjá SEV fer í dag beint upp í loft, uttan at nakað verður gjørt fyri at brúka hitan til vinnulig endamál. Talan er um upphæddir fyri fleiri milliónir krónur, sum vit rætt og slætt oyðsla burtur.

Men nú skal vend koma í, skrivar blaðið. Í gjár fóru 12 føroyingar til Noregs, har teir skulu luttaka á einum norðurlendskum skeiði um endurnýtslu av spillhita frá elverkum.

Í blaðnum er ein grein um donsku hjúnini Keld og Hilda Heick, sum koma til Føroya hósdagin. Tey skulu syngja í Kvøldloti í Havn hóskvøldið, í VB-húsinum fríggjakvøldið, í KÍ-høllini leygarkvøldið og í Glyvra Bio sunnukvøldið, umframt at tey eisini skulu vera við á konsertini hjá NSÍ í ítróttarhøllini í Runavík næsta leygarkvøld. Tað er bólkurin Springs úr Hoyvík, sum skal ferðast kring landið við Keld og Hildu.

*Kelda: Sosialurin 19. februar 1985*



Síða 5

ki

vari frá

Keld & Hildu eru í fremstu røð í donsku undirhaldsverðini. Tey eru áhaldarlig, sjálvsinnisk og livlig á palli og tey eru professionell

## Keld & Hilda koma hósdagin

Hósdagin koma til Føroya ... Men síðani hava tey havt



tíðindablaðið sosialurin

Í hoppskoti

Hetta er oyðsl av milliónum av krónum



## Andlát og jarðarferðir

**Hjørdis Joensen úr Sandavági** andaðist á Sýnini mikukvøldið, 80 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Sandavágs kirkju leygardagin kl. 14 Tey, ið vilja minnast Hjørdis, kunnu lata langommusoninum Lukasi eina peningagávu, konta í Føroya banka

**Steingrím við Stein, búsitandi í Skibby**, ættaður úr Tórshavn, andaðist í heiminum týsdagin 16. februar, 84 ára gamal.

## Merkisdagar



**30 ára føðingardagur**
27. mars fyllir Ruborg Haraldsen, Saltangará, 30 ár. Føðingardagurin verður hildin á Sjókafeini kl. 19. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Ruborg, kunnu tekna seg á tlf. 310826 ella 256345 áðrenn 23. mars.

**80 ára føðingardagur**
Leygardagin 20. feb. verður Palli Olsen í Fuglafirði, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**80 ára føðingardagur**
25. feb. verður Selma Heinesen, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin á Brekku 16. Frá kl. 18.

**80 ára føðingardagur**
28. feb. verður Hildigarð Nattestad, Hvalba, 80 ár. Dagurin verður hildin 20. feb. í gistingarhúsinum í Øravík, kl. 18, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
1. mars fyllur Henning Mortensen, Argjavegur 40, Argir, 80 ár. Dagurin verður hildin sunnudagin 28. feb. í AB-húsinum frá kl. 17.

**Gullbrúdleyp**
4. feb. høvdu Oda og Árni Frederiksberg á Strondum gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin fríggjakvøldið 19. feb kl. 18 í Kelduni í Skálafirði. Øll eru vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 28. feb. hava Oddvør og Kornelius Johannesen við Gjógv gullbrúðleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum við Gjógv leygardagin 27. feb. frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Diamantbrúdleyp**
Sunnudagin 21. feb. hava Jóhanna Maria Kirstin, vanliga kallað Hannimia, og Sigurd Sofus Nybo, Hósvík, verið gift í 60 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**Brúdleyp**
Sunnudagin 21. feb. giftast Thomas F. Johannessen, Æðuvík, og Ann-Margit Hansen, Saltnes. Opið hús verður í Stóratún 14, Æðuvík, frá kl. 18.

**Brúdleyp**
Páskadag 4. apríl giftast í Thyregod Kirke, Súsanna Joensen frá Svínoy og Kim Gotsæd. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma í brúðleyp, biðast vinarliga siga frá á tlf: 0045 26535429 áðrenn manadagin 15. mars.

**Brúdleyp**
Leygardagin 24. apríl giftast Joan Simonsen, Saltangará og Rúni Jallson Niclassen, Skáli. Vígslan verður í Glyvra kirkju kl. 14. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða Brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at tekna seg innan 10. apríl á tlf. 262713, 448051 (Joan) ella 256043, 441603 (Rúni).

**Prógv**
Beinta Vatnsdal hevur 29. jan. fingið prógv sum tannrøktari á Universytetinum í Århus.

## Dagurin

19. februar. Ammon, deyður umleið ár 250. Var ein av teimum rómversku hermonnunum, sum við at síggja dirvi og trúarvissu teirra kristnu. Sjálvur gjørdist kristin og varð tikin av døgum.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*